# ÚTLOND

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

*- Yvirgangsatsóknin í Mumbai var meinlík teimum atsóknum, sum al-Qaeda plagar at vera uppií*
*Condoleezza Rice*

# NATO leitar eftir nýggjum aðalskrivara

**Næsta summar skal verjusamgongan hava nýggjan aðalskrivara, og fyribils tykist danski forsætisráðharrin vera tað besta boðið**



*Anders Fogh Rasmussen avsannar, at hann er á veg úr donskum politikki*
*Mynd: Polfoto*

Í Danmark hava fjølmiðlarnir leingi gitt, at Anders Fogh Rasmussen, forsætisráðharri, er á veg burtur úr donskum politikki, og at hann skal taka við sum aðalskrivari í NATO, tá niðurlendingurin Jaap de Hoop Scheffer fer frá næsta summar.

Men hóast fjølmiðlar aðrastaðni í Evropa eisini hava nevnt danska forsætisráðharran sum tað besta boðið upp á aðalskrivarastarvið, so hevur høvuðspersónurin sjálvur víst tíðindunum aftur. Anders Fogh Rasmussen hevur fleiri ferðir sagt, at hann er ikki valevni til nakað altjóða ella millumtjóða starv, og í síðsta mánað segði hann, at hann ætlar sær at stilla upp á næsta fólkatingsvali og at halda fram sum forsætisráðharri, um fólkið vil tað.

Danski forsætisráðharrin verður sagdur at hava tann fyrimun fram um fleirii onnur evni, at hann er virkandi stjórnarleiðari, og so hevur hann rættiliga góð viðurskifti við leiðararnar í teimum fremstu NATO-londunum. Harafturat er tað ein fyrimunur, at hann umboðar eitt av teimum smáu limalondunum.

## Tvey donsk evni

Men tað er ikki alt, sum talar fyri, at Anders Fogh Rasmussen er tað besta boðið, tá saman um kemur. Tað eru ikki øll NATO-londini, sum er so fegin um tað góða vinarlagið millum forsætisráðharran og fráfarandi amerikanska frosetan, George W. Bush, og harafturat er tað ein vansi fyri hann, at Danmark er ikki uppi í verjusamstarvinum hjá ES.

Aðalskrivarastarvið var millum evnini á uttanríkisráðharrafundinum hjá NATO í vikuni, men eygleiðarar í Bruxelles siga, at NATO fer ikki at taka nakra týðandi avgerð um aðalskrivarastarvið, fyrr enn Barrack Obama og hansara stjórn hava tikið við tann 20. januar.

Týska blaðið Der Spiegel heldur, at danski verjumálaráðharrin, Søren Gade, er eisini eitt boð upp á aðalskrivarastarvið. Onnur evni eru sambært blaðnum bretski verjumálaráðharrin, Des Browne, fyrrverandi polski forsetin, Alexander Kwasniewski og polski uttanríkisráðharrin, Radoslaw Sikorski.

## STUTT SAGT

### Obama ikki hugtikin av Cameron

Barrack Obama hevði lítið gott at bera konservativa floksformanninum í Bretlandi, David Cameron, eftir at teir báðir høvdu havt ein stuttan fund í summar, tá Obama var á vitjan í London. Í blaðnum New Statesman stendur at lesa, at Obama var ikki serliga hugtikin av bretska floksformanninum, men at hann tvørturímóti umrøddi Cameron sum ein „politiskan lættvektara", sum blaðið skrivar.

Millum annað skal Cameron hava havt eina heilt aðra uppfatan av ES enn Obama, sum 48 tímar frammanundan hevði hildið røðu á Brandenburger Tor í Berlin, har hann hevði lagt dent á týdningin av samstarvi millum Evropa og USA. At Cameron tók undir við innrásini í Irak bøtti ikki um umdømi hansara í hugaheimi Obama, skrivar New Statesman.



*Barrack Obama hitti David Cameron í summar*
*Mynd: AP*

### Bróta lógina um somu løn

Ein kanning av lønarviðurskiftunum hjá monnum og kvinnum á svenska arbeiðsmarknaðinum vísir, at ein stórur meiriluti av arbeiðsgevarunum bróta lógina, sum sigur, at menn og kvinnur skulu hava somu løn fyri sama arbeiðið.

Higartil hevur kanningarúrslitið havt við sær, at umleið 5.000 løntakarar hava fingið lønarhækking í samsvari við lógina, skriva svenska tíðindastovan TT, sum sigur kanningina vera ta størstu av sínum slagi í Svøríki nakrantíð.

### Taiwan vil ikki hava Dalai Lama á vitjan

Útlagni leiðarin hjá tibetanska fólkinum, Dalai Lama, fær neyvan nakra almenna móttøku, kemur hann til Taiwan. Í hvussu er segði taiwanski forsetin í gjár, at eftir hansara tykki eru viðurskiftini ikki tey røttu til eina tílíka vitjan. Politiskir eygleiðarar siga, at orðini eru uttan iva ætlað at sissa leiðararnar í Beijing. Teir meta Dalai Lama sum ein fígginda og Taiwan sum ein part av Kina.

# Paul Watson aftur á ferð

**Oddamaðurin í Sea Shepherd kemur tó ikki á okkara leiðir á hesum sinni**



*Daryl Hannah og Paul Watson á tíðindafundi í Brisbane*
*Mynd: AP*

Paul Watson, navnframi oddamaðurin í umhvørvisverndarfelagsskapinum Sea Shepherd, fer nú í Suðurhøv at forða japonskum skipum at veiða stórhval har. Japanar hava boðað frá, at teir ætla sær at veiða umleið 900 sildrekar og 50 , men Paul Watson ætlar sær at órógva japonsku skipini, so tey ikki fáa fullført ætlanina, skrivar AP.

Sea Shepherd hevur riggað skipið „Steve Irwin" til ferðina, og ætlandi skuldi skipið fara úr Brisbane í Avstralia í dag. Paul Watson hevur sagt, at ætlanin er ikki at seta mannalív í váða, men hann væntar heldur ikki, at tær japonsku manningarnar fara at sita hendur í favn.

Tey japonsku hvalaskipini fóru úr Japan fyri trimum vikum síðani. Paul Watson sigur, at eftir ætlanini kemur „Steve Irwin" á hvalaleiðina um miðjan desember, og ætlaniner so, at skipið skal verða har til eina ferð í mars.

Millum teirra, sum manna „Steve Irwin" hendan túrin, er amerikanska filmskvinnan Daryl Hannah. Á tíðindafundi í Brisbane í gjár rósti hon Sea Shepherd og øðrum umhvørvisverndarfelagsskapum fyri arbeiði teirra.

- Hetta eru menninir, sum stríðast ímóti ólógligari hvalaveiði, segði hon.